| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 30. januar 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 30. januar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. januar 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 01/2014.**

***Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2013***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá fyrisitingini, dagfest 20. januar 2014 saman við grannskoðaðum roknskapi fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2013 frá "Januar – løggilt grannskoðaravirki" saman við grannskoðarafrágreiðing fyri bókasavnið.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið **kr. 736.627,24** móti mettum kr. 763.529,00. Sostatt eru kr. 27.001,76 minni nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 1.075,59 lægri enn mett, so nú er samsvar vorðið millum avseting og nýtslu. Býráðið setti tann 01. mai 2011 nýggjan bókavørð við útbúgving í starv, og at lønin hjá hesum er væl hægri flokkað enn fyribilsstarv hjá bókavørði uttan útbúgving, og tí varð avsetingin fyri 2011 ov lág. Hetta er nú komið í rættlag fyri bæði 2012 og 2013.

Húsaútreiðslurnar hava verið kr. 6.520,39 lægri enn mett, eitt nú grundað á at ljós og hiti hevur havt eina lægri útreiðslu upp á kr. 14.234,10, meting kr. 62.600,00 brúkt kr. 56.079,31. Tó er meirinýtsla upp á kr. 7.703,41 fyri umvælingar, skattir og tryggingar og reingerð. Mett kr. 9.900,00 brúkt kr. 17.603,41. útreiðslur til bókakeyp og innbinding hava verið kr. 1.837,24 lægri enn mett, við tað at metinin varð kr. 129.000,00, meðan staðfesta nýtslan hevur verið kr. 127.162,76.

Aðrar útreiðslur hava verið kr. 18.056,24 lægri enn mett. Lækkingin stavar frá minniirútreiðslum í sambandi við keyp av vørum, lýsingum og telefon, . Avsettar vórðu kr. 115.929,00 í fíggjarætlanini, meðan nýtslan hevur verið kr. 97.872,76.

Inntøkurnar hava verið kr. 170.022,00 í landskassastuðli móti mettum kr. 305.412,00, t.v.s. kr. 135.390,00 minni enn mett, og hevur kommunan sostatt borðið restina av kostnaðinum – inntøkur upp á kr. 2.386,00 ella 564.219,24.

Bókasavnslógin heimilar upp til 40% í stuðli av eini góðkendari rakstrarætlan. Stuðulin verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður, eftir rakstrarætlanini fyri árið eftir. T.v.s. at rakstrarstuðulin sum er inntøkuførdur í 2012 er grundaður á rakstrarætlanina fyri 2013. Sambært rakstrarætlanina fyri 2013 varð roknað við einum kostnaði upp á kr. 763.529,00 at reka bókasavnið.

Soleiðis skuldi landskassastuðulin verið kr. 305.410,40 men sambært skrivi frá Føroya Landsbókasavni dagf. 16. juli 2008, verða bert kr. 460.000,00 góðkendar sum útgjaldsgrundarlag, sum hetta skuldi givið kommununi kr. 192.000,00, men eru játtanin eftir hetta lækkað niðan í kr. 170.022,00 ella við kr. 21.978,00.

Víst verður eisini til skriv frá Søvnum landsins, dagfest 07. juni 2013, at roknskapurin fyri 2012 vísti kr. 785.061,00, innsenda fíggjarætlanin fyri 2014 kr. 863.000,00, góðkenda fíggjarætlanin teirra vegna kr. 425.056,00, so ætlaða stuðulsveitingin í 2014 verður bert 170.022,00 svarandi til 19,70%. Sostatt verður kommunan at rinda 80,3% ella kr. 692.989,00.

Sostatt er einki sum helst lutfall millum tey 40%-ini hjá landskassanum og tey 60%-ini hjá kommunukassanum. Við tí støði, sum Søvn landsins hava lagt undir raksturin av bókasavninum, so skal hesin bert verða kr.425.056,00 ella eina slaka ½ av tí, sum býráðið annars hevur tikið avgerðir um fyri 2014.

Roknskapurin 2013 vísir, at kr. 135.388,40 resta í Landskassastuðli, um talan varð um 40%, so er býtið 60>40% er ikki í lagi. Sambært roknskapinum er hetta 77>23%.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 22. januar 2014, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2013 uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og góðkenna grannskoðaða roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2014 uttan viðmerkingar. (9-0). Roknskapurin verður undirskrivaður av borgarstjóra og býráðsskrivara, meðan grannskoðarafrágreiðingin verður undirskrivað av mentamálanevndini.

**<u>Mál nr. 02/2014</u>**

**Leigusáttmáli við P/F Sandskip fyri læknaviðtaluna.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 12. desember 2013 tikið avgerð um at beina leigumálið við P/F Sandskip fyri læknaviðtaluna í bygninginum á matr. nr. 594 á Toftavegi 1 í Fuglafirði aftur í fíggjarnevndina.

Talan er tó ikki um sjálvt leigugjaldið á kr.700,00 fyri fermeturin + meirvirðisgjald frá 01. januar 2013 at rokna, sum býráðið tók avgerð um at góðtaka.

Hinvegin verður heitt á fíggjarnevndina um at arbeiða víðari við at gera uppskot til leigusáttmála partanna millum, sum greitt lýsir longd av leigutíðarskeiði og uppsøgn, sum kann fara fram í tíðarskeiðnum.

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 14. januar 2014, sum sent er Gordoni Martini Midjord, stjóra í P/F Sandskip til ummælis og at koma við møguligum viðmerkingum í seinasta lagi 16. Januar 2014 kl. 16.00.

Staðfest er, at eingin viðmerkingin er innkomin til fyrisitingina hvørki frá eigara ella frá fíggjarnevndarlimum.

Upplýsast skal, at leiguupphæddin kr. 95.200,00 + meirvirðisgjald fyri árið 2013 er flutt P/F Sandskipum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið til leigusáttmála á fundi tann 22. januar 2014 og mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið til sáttmála við P/F Sandskip fyri læknaviðtaluna í bygninginum á matr. nr. 594 á Toftavegi 1 í Fuglafirði uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna uppskotið til leigusáttmála millum kommununa og P/F Sandskip fyri læknaviðtaluna í miðhæddini í bygninginum á matr. Nr. 594 á Toftavegi 1 í Fuglafirði. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikinvar Sigurð S. Simonsen ikki á fundi vegna ógjegni.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.35.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen